KÍ hægri enn fyrr í ár

Málveitslan varð avlýst, og tað gekk striltið at fáa sigurin til høldar ímóti botnliðnum av Sandi

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað hevur gingið upp og niður hjá klaksvíkingum í ár. Á støðutalvuni sást, at niðurtúrarnir hava kostað nógv. Undan B71 dystinum var málmunurin -12 mál. Møguleikin, at pynta eitt sindur um hetta sunnudagin, mundi kennast ikki so langt burtur. Kurt Mørkøre, Alexander Djordjevic og Hjalgrím Elttør eru málsóknir, og teir áttu at havt gott pláss ímóti B71. Men tað spurdist lítið burturúr.

Í fyrra umfarinum pakkaði B71 seg væl saman á egnari hálvu. Teir á heimaliðnum høvdu bóltin heilt nógv, og teir spældu seg til fleiri møguleikar at fáa mál. Men veteranurin í B71 málinum stóð enn eina ferð sum ein brandur, og so vóru framrættaðu menninir hjá KÍ ikki so neyvir og avgjørdir.

Kurt Mørkøre hevði í 1. hálvleiki tvey góð skot, og Alexander Djordjevic hevði bæði skot og góðan stútari, sum vóru tætt við, og eina ferð rakti hann í tvørtræið.

Einasta málið undan steðginum kom mitt í fyrra umfarinum. Ove Nysted, sum hesa ferð var í miðverjuni, var omanfyri allar hinar, tá hornaspark kom innfyri, og hann drønstútaði í kassan.

Tað eydnaðist Hjalgrími og hinum úr Klaksvík at vinna sær trý stig móti sandoyingum, so enn halda teir fast um møguleikan fyri heiðursmerkjum

Setningurin hjá KÍ var, at teir skuldu fáa bóltin út í borðini, har unglingaspælararnir Atli Danielsen og Hjalgrím Elttør høvdu sínar ódnir. Tað komu fleiri innlegg úr borðunum og til stóru menninar, sum Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen og Bjørn Thorsteinsson høvdu tungu uppgávuna at taka sær av. Teir fingu góða hjálp frá stinna málverjanum.

Men klaksvíkingarnir nýttu ikki nóg ofta síðurnar. Í staðin varð ofta roynt at stinga fram eftir miðásinum, og tá varð tað væl lættari hjá sandoyarverjuni at byrgja upp fyri.

B71 løtan

Eftir steðgin setti Kári Reynheim seg sjálvan á vøllin. Hann kom inn fyri vongverjan í høgru, Hans Jørgen Djurhuus. Útskiftingin var neyðug, tí vongverjin í 1. hálvleiki hevði fingið gult kort, og ivaleyst mundu sandoyingar kenna, at tað so skjótt kundi koma fyri, at eitt gult kort afturat kom orsaka av skjóta Hjalgrími Elttør.

Innskiftingin av Kára Reynheim, sum hevði bestu B71 skotroyndina í 2. hálvleiki, hevði onkrar umskipingar á B71 liðnum við sær. Og fyrrapartin av seinna umfarinum vóru gestirnir í Klaksvík væl betri við, enn teir høvdu verið í 1. hálvleiki.

Serliga Kári Nielsen var eyðsýndur. Hann hevur fín evni sum fótbóltsspælari. Hann hevur góðan bóltføreleika, hann er skjótur, og hann hevur sjálvsálitið, sum skal til. Spell at skaði hevur hildið honum burtur so leingi í ár. Kári Nielsen megnaði fleiri ferðir at sneiða fleiri klaksvíkingar av sær. Í fleiri førum var talan um næstan málmøguleikar, men tað spurdist ikki meiri burturúr, enn at klaksvíkingar á og kring vøllin ofta noyddust so at siga at halda ondini.

Koppaði heim eftir

Síðsta lítla korterið gjørdist KÍ yvirvágin størri aftur, og KÍ hevði eisini í 2. hálvleiki fleiri málmøguleikar. Eitt nú tá Tomislav Sivic varð spældur í góða skotstøðu.

Kurt Mørkøre staðfesti heimasigurin. Alexander Djordjevic, sum í gjár fór heim til Jugoslavia, har hann verður næstu tíggju dagarnar, legði væl innfyri úr høgru. Kurt var kaldur, tamdi, brúkti skotfintuna og smekkaði í kassan. Tá restaðu sjey minuttir, og so var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Einki mál kom afturat. KÍ hómar bronsuna, men teir í Klaksvík eru ivaleyst nøgdir við at varðveita fjórða plássið. Síðstu løtuna loysti unglingaspælarin Rógvi Laksáfoss Tomislav Sivic av, og Símun W. Høgnesen, sum hevur verið burturstaddur, kom inn fyri smáskadda Ova Nysted. At U–15 landsliðsvenjarin Bill Jacobsen síðstu minuttirnar var á vøllinum, mettu áskoðararnir sum eina joke, og onkur hevði hug at illneitast.

Sandoyingar høvdu vónað at fáa eitt stig, men teir tóktust ikki serliga vónsviknir. Bjargingarroyndin hjá teimum verður m. a. á heimavølli, tá HB kemur suður.

KÍ: Meinhardt Joensen – Ove Nysted, Jan Andreasen, Andrass Jacobsen – Atli Danielsen, Jan Joensen, Tomislav Sivic, Fríðin Ziskason, Hjalgrím Elttør – Kurt Mørkøre, Alexander Djordjevic

B71: Valdemar Nowisci – Hans Jørgen Djurhuus, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson, Svenning W. Hansen – Sverrir Kjærbo, Jón Brekku, Julian Floresco – Eli Hentze, Kári Nielsen

Favoritturin á odda

Klaksvíkingurin Ólavur Simonsen, sum hevur heili 270 ratingstig fleiri enn næstovasti telvari í Íslandssúlukappingini, liggur einsamallur á odda.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Árliga Íslandssúlukappingini fór av bakkastokki hetta vikuskifti í hølum Havnar Telvingarfelags, og stór sannlíkindi eru fyri at ratingfavoritturin vinnur hesa heldur styrksiveika kapping. Ólavur Simonsen er nevnliga einsamallur á odda, og somuleiðis einasti telvari í hópinum sum hevur yvir 2000 í rating. 2235 er nýggja ratingtal hansara, og merkir tað hann nú hevur sníkt seg framum Torbjørn Thomsen, Eyðun Nolsøe og Flóvin Tór Næs.

Fýra umfør eru leikt, og tey seinastu trý talvini verða telvd komandi vikuskifti. Av teimum fjúrtan luttakararnum royna millum annað eisini Hans Kristian Simonsen, Sámal Christiansen og Kári Durhuus eydnuna.

Kassameistarin leyp hvøkk á Ólav

Runavíkingurin Eyðun Lamhauge, sum røkir pengakassan í Talvsamband Føroya, niðurspældi Ólavur í fyrsta umfarinum. Hendan niðurspæling førdi tó ikki meir enn til ein javnleik. Ov stór virðing fyri fjórðhægst rataða telvaranum í Føroyum var orsøkin. Eyðun hevur 610 ratingstig færri enn Ólavur, og er tí javnleikurin eitt bragd sum hann kann vera nøgdur við.

Ólavur verður ringur at steðga av tí at hann hevur hitt teir nærmastu kappingarneytarnar. Umframt javnleikin ímóti kassameistaranum, hevur hann vunnið á Hans Kristian Simonsen, Kára Durhuus og Ronny í Lon. Komandi fríggjadag fær hann Brandur Jacobsen yvir av sær, og hann er ikki hvør sum helst. Eisini kann Sámal Christiansen gera ein vørr, og tí kann Ólavur ikki enn kenna seg heilt vísan í støðu sínari.

Ikki bert hevur Eyðun yvirraskað, men so sanniliga eisini tann heilt ungi Rógvi Mortensen úr Havn. Hann er við í toppinum við sínum hálvumtriðja stigi, og heldur hann fram fer ivaleyst okkurt gott at spyrjast burturúr honum komandi árini.

Tíverri hevur ikki verið møguligt at fingið hendur í nøkrum talvi úr kappingini.

Støðan í toppinum:

Ólavur Simonsen	3,5 av 4
Eyðun Lamhauge	3,0
Hans K. Simonsen	3,0
Brandur Jacobsen	2,5
Rógvi Mortensen	2,5

Nýggjur ratinglisti pr. 12.08.01
Niðanfyri eru fullførdur listi yvir telvarar omanfyri 2000 í rating.

1.	John Arni Nilssen	2360
2.	John Rødgaard, IM	2315
3.	Heini Olsen	2265
4.	Ólavur Simonsen	2235
5.	Flóvin Þór Næs	2230
6.	Eyðun Nolsøe	2220
7.	Torbjørn Thomsen	2210
8.	Rani Nolsøe	2185
9.	Jens Christian Hansen	2165
-	Bogi Ziska	2165
11.	Carl Eli N. Samuelsen	2160
12.	Rógvi W. Rasmussen	2155
13.	Jóan Hendrik Andreasen	2100
14.	Steintór Rasmussen	2090
15.	Martin Poulsen	2085
-	Torben Ø. Johansen	2085
17.	Terji Petersen	2080
-	Torkil Nielsen	2080
-	Heini Danielsen	2080
20.	Martin Brekká	2060
21.	Finnbjørn Zachariasen	2050
22.	Olaf Berg	2040
23.	Herluf Hansen	2035

Skála Ítróttarfelag hevur ikki broytt støðu

Viðmerking frá Skála ítróttarfelag til ítróttatíðindini í ÚF leygarkvøldið

2. DEILD
Emil Jacobsen, formaður í Skála Ítróttafealg

Í ítróttatíðindunum í Útvarpi Føroya leygarkvøldið 25. august varð róð framundir, at Skála Ítróttarfelag hevur broytt støðu í kæruni, sum varð send Fótbóltssambandi Føroya, eftir 2. deildardystin móti HB 12. august í ár. Sagt varð, at Skála, fyri at vísa góðan ítróttaranda, umhugsaði at at góðtaka, at dysturin skal spælast av nýggjum.

Hetta hevur einki hald í veruleikanum, og tíðindamaðurin hevur ikki fingið hesa tíðindi váttað. Hvørki frá nevndini ella frá nøkrum øðrum ábyrgdarpersóni á aðrudeildarliðnum hjá felagnum.

Veruleikin er tann, at Skála áðrenn dysturin varð spældur, gjørdi HB vart við, at spældu teir báðir leikararnir við í dystinum, so varð kæra send kappingarnevndini hjá FSF HB brúkti leikararnar, og tí kærdi Skála.

Kappingarnevndin hjá FSF hevur viðgjørt kæruna og givið Skála viðhald, og har stendur málið, tí HB hevur gjørt av, um teir fara víðari við tí.

Skála hevur kært um, at HB brúkti tveir leikarar, sum høvdu leikt í 1. deild vikuskiftið frammanundan. Sambært grein 8, 1 stk, í kappingarreglunum er ikki loyvt leikara at flyta niður í lægri deild uttan so, at teir hava sitið ein dyst yvir í hægru deildini. Fyrstudeildardysturin millum GÍ og HB, sum sambært kappingarskipanini varð dagsettur tyil 11. august, varð útsettur til eina ferð í september, og tí høvdu leikararnir ikki sitið kravda dystin yvir. Hetta er brot á reglurnar, og í slíkum førum er bara ein avgerð hjá kappingarnevndini at taka, at tað er at døma HB at tapa dystin.

Síðani dysturin varð leiktur – og síðani kæran varð send inn – hevur Skála fingið upplýst og váttað, at annar av leikarunum, sum kært er um, varð leikbannaður við trimum gulum kortum. Sambært stk. 13 í frágreiðingini til kappingarreglurnar verður sagt um niðurflytingar, a tleikari, sum er leikbannaður í t.d. 1. deild, ikki hevur loyvi til at leika við lægri deild, fyrr enn hann hevur sitið leikbannið av. Tað heur hesin leikarin hjá HB ikki, og tí er eisini tann reglan brotin. Leggjast kann afturat, at leikarin sat leikbannið av, tá 1. deild hjá HB leikti móti VB í Vági vikuskiftið eftir dystin millum 2. deildarliðini hjá Skála og HB.

Hvat viðvíkur partinum um góðan ítróttaranda heldur Skála, at felagið hevur hildið seg innanfyri mark og reiðiliga tað. Felagið hevur undan dystinum gjørt mótstøðuliðnum púra greitt, at vórðu ólógligu leikararnir nýttir, varð kæra send FSF.

Vit hava skilt, at HB hevur fingið loyvi at brúka leikbannaða leikaran, hóast hetta er greitt brot á reglurnar. Kortini valdi felagið at brúka enn ein 1. deildarleikara, sum heldur ikki leyk treytirnar í grein 8, stk. 1 í kappingarreglunum. Sostatt er tað ikki Skála, sum hevur borið seg skeivt at, men HB. Tí halda vit tað vera púra burturvið at seta spurnartekin við ítróttarandan hjá Skála í hesum føri.

Málið er uppstaðið, tí tað er tvístøða millum HB og FSF. HB sigur seg hava fingið loyvi frá FSF at brúka leikaran, meðan FSF sigur seg ikki hava givið hetta loyvi. Hvør sigur satt í hesum føri, vilja vit ikki taka støðu til, tí tað er ikki okkara borð. Haraftur ímóti rakar tað okkum, at mótstøðulið brúkar leikarar, sum tey ikki hava loyvi til sambært kappingarreglunum, og tað er tað, sum felagið hevur kært um.

At enda vilja vit gra vart við, at tað er serstakliga óheppið, at Útvarp Føroya ber tíðindi, sum als ikki hava hald í veruleikanum, og serliga tá einki er gjørt fyri at kanna, um hald er í teimum.

Verjuspælararnir hava skorað

Sísðtu vikuna hava bæði Óli Johannesen og Øssur Hansen skorað mál í næstbestu deildini í Danmark

ÚTISETAR
Jóannes Hansen

Tað hevur verið mett at vera eitt sindur tunnligt har frammí á landsliðnum, sum hósmorgunin fer undir fyrireikingarnar til spennandi landsdystirnar á heimavølli ímóti Luksemburg og Russlandi.

Ofta verður tikið til orðatikið, at tá neyðin er størst, er hjálpin næst. Í hesum sambandi verður sipað til, at tveir av útisetunum á landsliðnum, sum ikki beinleiðis kunnu roknast sum álopsspælarar, tað síðstu lítlu vikuna hava skorað í næstbestu deildini í Danmark.

Sigursleysir

Óli Johannesen hevur seinastu vikurnar skorað tvey mál fyri Hvidovre. Tað fyrra skoraði hann, tá teir á útivølli í Skive spældu 2–2, og tað seinna skoraði hann mikukvøldið, tá Hvidovre hevði vitjan av grannunum úr Frem. Eisini tann dysturin endaði 2–2.

Hetta eru tey bæði fyrstu málini hjá Óla í ár. Í fjør skoraði hann eitt mál fyri Hvidovre. Tað var í tí dystinum, at hann eisini var so óheppin at gera sjálvmál.

Hvidovre hevur stórar ætlanir, men tey fyrstu umførini hevur tað gingið striltið. Teir hava bara megnað tríggjar javnleikir, hava tapt tvær ferðir, og teir hava ongantíð vunnið.

– Vit hava fleiri ferðir verið sera óhepnir. Eitt nú mikukvøldið, tá vit spældu ímóti Frem. Hóast Frem er oddalið, og vit ikki liggja væl fyri, so vóru vit greitt omaná, greiðir Óli Johannesen frá.

Tað var ikki fyrr enn í evstu løtu, at Hvidovre javnaði til 2–2. Óli Johannesen var málskjútti.

– Eg fekk boð um at fara fram, tá fimm minuttir vóru eftir. Eg haldi, at eg bara nart við bóltin eina ferð, og tað var, tá eg skoraði til 2–2.

Sunnudagin var Hvidovre og vitjaði í fyrrverandi Føroya liðnum Herfølge. Tað endaði málleyst.

– Eg má siga, at vit vóru sera hepnir. Eg haldi, at vit høvdu tvær royndir ímóti málinum, meðan teir høvdu eina rúgvu av málmøguleikum. Men málverjin hjá okkum, Steffen Andersen, sum er málverji á danska U–21 landsliðnum, bjargaði okkum undan tapi, sigur Óli Johannesen.

Øssur á talvuna

Omanfyri søgdu vit, at tað vóru verjuspælarar, sum skoraðu. Tað er kanska ikki rætt at siga, at Øssur Hansen er verjuspælari. Men á landsliðnum hevur hann havt verjukendan leiklut í vinstru, og í B93 er hann ytstur á miðvøllinum í vinstru.

Sunnudagin skoraði Øssur Hansen fyri fyrstu ferð fyri B93. Teir vóru í Odense og spældu ímóti B1909, sum eftir fleiri ár í aldudalinum nú hevur ætlanir um at stríða seg uppaftur og harvið at taka kappingina upp aftur við OB.

Men ímóti B93 fekk B1909 ein orduligan undir vangan. B93 vann 7–1, og Øssur Hansen skoraði fyrsta málið. Hetta var fyrsta málið, sum Øssur hevur skorað, síðani hann kom til Keypmannahavnar.

NSÍ-KÍ 5-3 (2-0)

Málríkur dystur

Verjuvillur kostaðu dýrt, tá klaksvíkingar vitjaðu í Runavík

2. DEILD
Jákup Mørk

NSÍ var omaná, tá næstubestu klaksvíkingar vitjaðu í Runavík leygardagin. Talan var um týðandi dyst, tí um klaksvíkingar vunnu, so tóku teir NSÍ aftur. Hinvegin kundi NSÍ leggja sjógv millum seg og botnin við einum sigri.

Og tað var NSÍ, sum vann dystin og harvið fór seks stig fram um KÍ, sum er næstniðast.

Dysturin var málríkur, og ótrygt verjuspæl kostaði helst KÍ ein javnleik.

NSÍ kom á odda 2-0 í fyrra hálvleiki. Fyrra málið gjørdi Mortan Hansen, sum nú er aftur í NSÍ, eftir at hann gjørdist leysur í eini frísparksstøðu. Jan Nónklett økti til 2-0, eftir at hann fór ígjognum sjálvur.

Stutt eftir hálvleikssteðgin kom KÍ afturíaftur. NSÍ'arnir svóvu eitt sindur, tá KÍ tók eitt skjótt fríspark. Innleggið endaði hjá Olgari Danielsen, sum stútaði bóltin upp um málverjan og í handara síðunet.

Minkaðu tríggjar ferðir

Løtuna aftaná hevði KÍ lítið trýst á NSÍ-liðið, og tað var hesa løtuna ikki óhugsandi, at KÍ fór at javna. Men so skoraði NSÍ, tá KÍ-verjan ikki fekk bóltin burtur. Dánjal Hansen smekkaði til úr 18 metrum, og bólturin sat í síðunetinum. Besta málið í dystinum!

KÍ minkaði til 3-2, tá Erling Fles fór ígjognum og skoraði úr spískum vinkli.

KÍ legði nú nógv fyri, og tað kostaði í verjupartinum. Jan Nónklett og Mortan Hansen sluppu einsamallir avstað frá miðjum vølli, og Jan skoraði í tómt mál, tá Mortan legði uppá tvørs.

Enn einaferð minkaði KÍ, og tað var aftur Olgar Danielsen, sum fekk sent bóltin í málið úr stuttari fjarstøðu.

Tá var tíðin um at fara, og NSÍ staðfesti sigurin við einum máli, sum innskifti Magnus Hansen gjørdi beint áðrenn leiklok.

NSÍ-KÍ 5-3 (2-0)

1-0: Mortan Hansen
2-0: Jan Nónklett
2-1: Olgar Danielsen
3-1: Dánjal Hansen
3-2: Erling Fles
4-2: Jan Nónklett
4-3: Olgar Danielsen
5-3: Magnus Hansen

Skála-LÍF 3-2 (1-2)

Skála vendi dystinum

Hóast teir eitt skifti vóru undir við tveimum málum, so megnaði Skála at halda fast um oddasessin í bestu deildini

2. DEILD
Jákup Mørk

Tað var ikki væntandi, at leirvíkingar skuldu gera stórvegis við skálamenn, tá dystur var millum liðini bæði leygardagin.

Hvussu var og ikki, so fingu skálamenn ein rættiligan skelk, tá farið varð ígongd, tí vi málum frá Peturi Sjúrðarberg og Tomek Resel høvdu leirvíkingar brádliga lagt seg á odda við tveimum málum móti ongum.

Fullu ikki í fátt

Skála hevði onkrar leikarar uttan fyri, og kundu tí ikki stilla við sterkasta liðnum, men at fáa eina slíka byrjan upp á dystin, høvdu teir neyvan droymt um.

Teir fullu tó ikki í fátt av teirri orsøk, men settu heldur ferðina upp í eini roynd at trýsta mótstøðumenninar, og hetta gav eisini úrslit, tá Arnold Berg minkaði um munin fyri steðgin.

Í seinna hálvleiki legði Skála alt fyri eitt trýst á mótstøðumálið. Leirvíkingar royndu í sín part at verja tepru leiðsluna, men hetta eydnaðist teimum.

Innskifti Alexandur Johansen, javnaði fyrst, áðrenn hann eisini legði Skála framum, men seinna málið noyðist Alexandur helst at geva Paula Hansen heiðurin fyri. Pauli snýtti at kalla alla LÍF verjuna við einari rørslu, áðrenn hann legði bóltin fyri føturnar á Alexandur, sum bert skuldi rulla bóltin inn í tóma málið.

Skála-LÍF 2-3

1-0: Petur Sjúrðarberg
2-0: Tomek
2-1: Arnold Berg
2-2: Alexandur Johansen
3-2: Alexandur Johansen